Útbúgving
Gransking
Um Setrið
Kunning
Lestrarvegleiðing
Ráð teirra lesandi
Innanseturs
EURAXESS
Upptøka 2016
E-umsókn
SACS 2016
Lestrarskrivstovan

# Kanningin av føroyskum rottum

Føroyskar rottur eru ikki fongdar við bakteriuni Leptospira interrogans, og so at siga bara loppur og lýs liva sum parasittar í skinninum á rottunum. Hetta vísa fyribils úrslit av kanningini av føroyskum rottum, sum Fróðskaparsetrið hevur gjørt.

27.11.2014 | Eyðfinn Magnussen, Fróðskaparsetur Føroya



| Bygd/Býur | Tal av rottum |
|---|---|
| Æðuvík | 13 |
| Argir | 1 |
| Eiði | 2 |
| Fuglafjørður | 2 |
| Kollafjørður | 42 |
| Miðvágur | 2 |
| Oyndarfjørður | 1 |
| Saltangará | 2 |
| Sandavágur | 2 |
| Tórshavn | 13 |
| Trongisvágur | 6 |
| Tvøroyri | 2 |
| Velbastaður | 4 |
| **Samlað** | **92** |

Tal av rottum, sum eru fingnar kring landið, til kanningarnar.

Í 2012 fór Fróðskaparsetrið, saman við øðrum, undir eina kanning av føroyskum rottum. Fyrsta stigið var at savna rottur kring landið. Heitt varð á fólk, sum høvdu fingið fatur á rottum, deyðum sum livandi, um at seta seg í samband við Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum, sum so kundi fáa rotturnar til kanningina.

Rotturnar skuldu nýtast til kanningar, sum skuldu staðfesta, um ein ávís bakteria er at finna í føroyskum rottunum. Eisini skuldi kannast, hvørjir parasittar liva á rottunum, eins og DNA-kanningar skuldu gerast, fyri at vita, hvaðani føroyska rottan hevur sín uppruna, og um tað er genetiskur munur millum rotturnar ymsastaðni í Føroyum.

**INNSAVNINGIN**
Rottur hava nú verið savnaðar í skjótt trý ár, og tað er eydnast mær at fáa fatur á tilsamans 92 rottum, sum eru fingnar frá fólki í 13 bygdum og býum kring landið.

**BAKTERIUKANNINGIN**
Tey fyrstu úrslitini eru nú við at vera klár. Í november mánað í 2013 vórðu prøvar frá teimum fyrstu 61 rottunum sendar til Danmarkar, har kannast skuldi, í hvønn mun føroyskar rottur eru fongdar við bakteriuni Leptospira interrogans. Hetta er ein bakteria, sum kann elva til sjúkuna leptospirosa, sum bæði fólk og dýr kunnu fáa.

Kanningarnar vístu, at ongar av teimum 61 rottunum høvdu bakteriuna í sær. Hildið var tó, at talið av kannaðum rottum var heldur lítið, og 4. november í ár vóru tí prøvar frá 34 rottum afturat sendir til Danmarkar til kanningar. Úrslitið av hesum kanningunum verður væntandi tøkt í endanum av hesum árinum.

Tá endaliga úrslitið fyriliggur, verður farið undir at skriva eina vísindaliga grein um kanningina. Eitt fyribils heitið á greinini er:
*"Apparent absence of Leptospira interrogans infection in Rattus norvegicus in the cool Atlantic climate of the Faroese Islands."*

**PARASITTKANNINGIN**
Kanningar eru eisini gjørdar av parasittum, sum liva uttan á rottunum. Vit funnu tilsamans 71 loppur og 2 lýs, sum síðani eru greinaðar sundur í ymisk sløg. Vit, Jens-Kjeld Jensen og Eyðfinn Magnussen, eru nú í holt við at skriva eina vísindaliga grein um hesi úrslitini. Greinin hevur fyribils fingið heitið:

*"Fleas (Siphonaptera) and lice (Phthiraptera) on Faroese rats (Rattus norvegicus)"*

**DNA-KANNINGARNAR**
Ætlanin er eisini at gera DNA-kanningar av rottunum, fyri at vita hvaðani føroyska rottan hevur sín uppruna, og um tað er genetiskur munur millum rotturnar í teimum ymisku føroysku bygdunum. Hesar kanningarnar eru tó ikki byrjaðar enn, men vit hava nú 92 DNA-prøvar, ið bíða í frystiboksuni, og sum vónandi fara at avdúka upprunan hjá føroysku rottuni. Vónandi gongur tað ikki alt ov long tíð, til hesar kanningarnar verða gjørdar.

**ÁHUGAÐI Í FLEIRI ROTTUM**
Vit eru framvegis áhugaðir í at fáa fatur á fleiri rottum, til kanningarnar.

So hevur tú fingið eina rottu:

- Koyra rottuna í ein plastikkposa.
- Skriva á ein seðil nær og í hvørjari bygd rottan er fingin. Um talan er um bygt øki, skriva so eisini gøtunavn og nummar á seðilin.
- Legg seðilin í plastikkposan. Bind væl fyri, og legg posan í frystaran.

So kann eg fáa rotturnar, tá høvið býðst.

Ert tú við uppá hetta, ella er tað okkurt, sum tú ert í iva um, so skrivað ella ring til:

Eyðfinn Magnussen
Teldupost: eydfinnm@setur.fo
Fartelefon: 265 831
Náttúruvísindadeildin
Nóatún 3 FO-100
Tórshavn

**GREIN UM VERKÆTLANINA**

Leys størv
Vísindastarv í búskaparfrøði
Námslektarastørv í sjúkrarøktarfrøði á Fróðskaparsetri Føroya - Endurlýsing
Undirvísingar- og granskingarstørv í námsvísindum á Fróðskaparsetrinum

Árskalendari
Til studentar
Altjóða Skrivstovan
Granskingardepilin
Búskaparráðið
Fróðskapur
Málráðið
Staðarnavnanevndin
Orðabøkur
Bókasavnsleiting
Stavarin

Seinastu tíðindi

13.04.2016
Stroyming av kvotu 2-kunning
Hoyr Holger Arnbjerg greiða frá um kvotu 2 í dag

12.04.2016
Nýtti kvotu 2-møguleikan sum lopfjøl
John Mikkelsen hevur í mong ár starvast í KT-vinnuni. Í 2012 søkti hann eftir kvotu 2 um at verða...

10.04.2016
Hugleiðingar um hølir
Arbeiðsbólkurin, ið fyrireikar eina framtíðarætlan um hølisviðurvíðurskifti á Setrinum, bjóðar nú...

08.04.2016
Kunning um kvotu 2 á Setrinum
Mikudagin 13. apríl er kunningarfundur um kvotu 2-umsóknir á Lestrarskrivstovuni.

05.04.2016
Útgáva: Ritgerð um støðu Føroya og Grønlands til ES limaskap
Fróðskapur hevur givið út bókina North Atlantic Euroscepticism. The rejection of EU membership in...

Fleiri tíðindi...

Vísir 1 til 10 av 1517
Síða 1 Síða 2 Síða 3 Fram